


www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 06 - 2013

# Seismikkskip skiftir manning í Havn

Seismikkskipið hjá útlendska felagnum Westen Geco, WG Vespucci er í hesum døgum á Havnini, har tað hevur skift 40 av manningini umframt at lossa kápultrumlur o.a., sum skal sendast av landinum. Skipið, sum er rættiliga sjáldsamt á at líta við sínum serstaka stevni, er 90 m langt og 19 m breitt. Tað kemur so eisini inn í føroyska havn eftir vatni og provianti. Tað gerst alsamt meira vanligt, at útlendsk seismikkskip leggja at landi í føroyskari havn fyri at skifta manning og taka vørur umborð. Tað er Thor í Hósvík, sum er umboð fyri Western Geco.